Viðmerking:

Viðmerking til samtykt biskupanna

Eftir áheitan høvundans prenta vit hesa oddagrein, sum stóð í Trúboðanum 19. november 1997:

So fall avgerðin. Biskuparnir í kirkju okkara (undantikin okkara egni!) hava orðað ein samtykt viðvíkjandi samkyndum. Samtyktin er ein neyðsemja, tí semja var ikki ímillum biskuparnar, men ein neyðsemja, sum greitt letur upp fyri tí, hon sigur seg at nokta, ritu-ali. Tí eru teir ímóti, men teir eru fyri møguleikanum „undir gudstænastu alment at vísa á (markera), at gingið er saman í skrásett paralag".

Í seinra Pætursbrævi verður sagt, at tað ikki eru „snildiliga samanpentaðar søgur", vit kunnu fylgja, men eina Guds orði, sum „menn frá Guði talaðu, drivnir av heilaum anda." (2. Pæt. 1,16.21). Mær kemur tað fyri, at samtykt biskupanna er dømi um slíkar søgur. Í staðin fyri heitið „søgur", kunnu vit seta „samtykt" og tað biskupasamtykt. Trupulleikin við henni er, at hon grynnur hvørki bíbilskt ella játtanarliga.

Tað góða fyrst...

Tað er gott, at biskuparnir í samtykt síni halda fast við, „at hjúnalagið er Guds góða skipan fyri lívsfelagsskap ímillum mann og konu". Tað er betri, at teir halda fast við tá hjúnalagsáskoðan, „sum samsvarar teimum bíbilsku skriftunum og okkara kirkjuliga siðaarvi." Men tað besta er, at biskupur okkara, Hans Jacob Joensen, ikki tók lut í samtyktini. Biskupur okkara skal fáa størstu tøkk fyri grundgeving sína, „at tað sambært Skriftini ikki [er] í lagi at liva saman sum samkynd. Og av tí at slíkt samlív er ímóti tí, sum Skriftin sigur, kann tað ikki signast." Hans Jacob Joensen hevur ikki bara hildið fast við at hjúnalagið samsvarar teimum bíbilsku skriftunum, hann heldur eisini (og tað í mun til allar hinar starvsfelagar sínar!) at tað hevur Skriftina ímóti sær at liva saman sum samkynd!

... so tað ringa

Slíkum tekstum líkt, er hann trupul at viðgera. Samtyktin er sum hvalspýggjan - lítið annað ein vatn. Hon er sum tann snildiliga samanpentaða søgan, rund og tannleys, men hon hevur ein ringan anda. Í fyrstu atløgu tykist hon at vera á einum støði, sum sømir seg kirkjunnar ovastu monnum, men nærkast ein tekstinum, stendst roykur av honum. Tokuroykur! Í fyrstu atløgu sær ein ikki, hvat er á vási, men so sær ein sniðlop á kirkjunnar grundarlag, sum kemur at kosta henni dýrt.

Fólki kunnugt, byggir fólkakirkja okkara á Bíbliuna og við henni á **tey fimm játtanarritini**. Eitt teirra er Augsburgska trúarjáttanin frá 1530. Fyri at grundgeva at tað er í lagi at liva saman í skrásettum paralagi siga biskuparnir: „At [samkynd] liva í einum av samfelagnum skrásettum paralagi, stríðir ikki ímóti ..játtanarstøði fólkakirkjunnar: At øll menniskju verða rættvísgjørd við trúgv á Kristus (Augsburgska trúarjáttanin, 4. grein). - *Rætt er tað, at samkynd eins og hinkynd verða rættvísgjørd við trúgv á Kristus, men tað er rangt, at nakar av teirri orsøk kann liva í syndini (Róm. 8,8)!*

Bíbliuna siga biskuparnir seg ikki at vera á einum máli um, men tað teir hava einst um, eru nøkur orð Jesu. Fyri at grundgeva sína fatan av 4. grein í Augsburgsku játtanini siga teir: „Í hesum sambandi meta vit tað dupulta kærleiksboðið kristiliga sæð at vera ein grundleggjandi etiskan norm: Tú skal elska Harran Gud tín av øllum hjarta tínum - og næsta tín sum sjálvan teg" (Smb. Matt. 22,34-40 o.s.fr.). - *Rætt er tað, at vit eiga at elska Gud og samkynd eins og hinkynd, men tað er rangt at nýta hesi orð Jesu til tess at grundgeva, at tað er í lagi at liva saman í samkyndum parlagi. Jesus samanfatar tey 10 boðini í tí dupulta kærleiksboðnum, hann avtekur tey ikki. 6. boð og í tí sambandi eisini tað, sum Bíblian sigur um samkynd eru enn í gildi (Sí 1. Mós. 19.1-11 og Dóm. 19; 3. Mós. 18,22 og 20,13; Róm. 1,18-32 og 1. Kor. 6,9-10 og 1. Tim. 1,8-11)!*

Ein kann fáa tað fatan, at Bíblian og játtanarrit okkara verða missnýtt til tess at náa málinum, at samkynd veruliga fáa kirkjuliga signing. Og tað tykist sambært útsøgnum frá fleiri, at hetta mál longu er nátt. Í samtykt biskupanna stendur jú so rúmsátt, at møguleiki skal vera „undir gudstænastu alment at vísa á (markera), at gingið er saman í skrásett paralagið".

Við orðingunum í samtyktini verða drignar niðurstøður, sum heilt mótsiga hvør aðrari. Onkur sigur seg at kunna signa, ein annar seg at kunna nokta signing. Fyristøðufólk vísa á tað í samtykini orðaða at „sambært galdandi kirkjulóg finst .. møguleikin", at prestur kann nýta kirkjuna til tað, hann vil. Mótstøðufólk vísa á, at í samtyktini stendur, at prestur „skal ... í hvørjum einstøkum føri leita sær vegleiðing hjá biskupi sínum". (Sí t.d. *Kristeligt Dagblad*, nr. 25 og nr. 30). So, møguliga er ein bremsa, men hvussu leingi? Svarið er treytað av, hvør heldur henni: Guds orð ella manna orð.

Snildiliga er samtyktin samanpenta, men við Skriftina samsvarar hon ikki!...

Bergur D. Joensen

Tað niðurpínda samfelagið - ella søgan um dykkarasjúku

Ongin dagur gongur, uttan søgur um, at føroyska samfelagið er niðurpínt. Syndarin sigst vera, at henda samgongan sparir upp til fullveldið.

Tað er púra rætt, at ótrúliga nógvir trupulleikar eru á grundleggjandi samfelagsøkjum — serliga á samferðsluøkinum, sjúkrahúsøkinum og almannaøkinum. Hesir trupulleikar og tann stóri fløgutørvurin hava sín uppruna í einum samfelag og einum búskapi, sum ikki bygdi á tryggleika og egnan førleika, men á árligar peningainnsprænningar og lántøku aðrastaðnifrá. Tað elvdi til, at vit eftir at alt skrædnaði, niðurpíndu alt í nærum 10 ár.

Men tað er beinleiðis skeivt at geva fullveldinum skyldina fyri niðurpíning av samfelagnum.

Stórar, men ikki nøktandi betringar

Núverandi samgonga og landsstýri hava sett sær fyri, at vit skulu hava ein sjálvberandi búskap. Tað merkir, at vit ikki bara aftur kunnu fara at skapa ein búskap, sum byggir á danskar pengar og lántøku, tí so vita vit, hvør fær rokningina og ferðin hjá teimum veikastu rýkur.

Hetta áttu vit at samst um, uttan mun til, hvat vit halda um fullveldisætlan landsstýrisins. Í Hvítubók siga búskaparfrøðingarnir so greitt, at vit mugu skapa ein sjálvberandi búskap uttan blokk — uttan mun til fullveldisætlan ella ikki. Annars endar galið aftur.

Tí er farið undir at byggja samfelagið uppaftur eftir kreppubúskapin við langtíðarætlanum og betringum á teimum týdningarmestu økjunum:

Almanna- og Heilsumál eru hækkaði við 137 milliónum krónum uppá tvey ár, meðan Undirvísing og gransking eru hækkað við 63 milliónum krónum uppá tvey ár. Studningurin til fiskivinnuflogur er hinvegin strikaður. Hartil eru fløgur gjørdar í samferðsluna við nýggjum Sandoyarskipi og næsta ár verður farið undir at byggja nýtt, nútímans skip til Suðuroyarleiðina og at byggja nýtt Landssjúkrahús.

Ikki spæla jólamenn

Hetta er ein spurningur um ábyrgdarfullan búskaparpolitik og tryggleika undir føroyska búskapin. Tað fara at ganga nógv ár, áðrenn vit eru komin úr kreppuni undir heimastýrinum. Tað fer eisini at valda ónøgd nógvastaðni, inntil vit hava bygt nýggjar og egnar skipanir upp. Vit eru ikki komin úr kreppuni, fyrrenn vit kunnu veva blokkstuðlin heilt fyriuttan.

Tað lættasta í verðini hjá politikarunum í dag, er at spæla jólamenn og bara blæsa yvirskotið á fíggjarlógina út til øll tey økir, ið tørva. Til tað krevst yvirhøvur ongin førleiki. Tað krevur bara, at vit skrúva høvdið av og stinga tað undir armin.

Tí mugu vit smyrja okkum við, at allar ákoyringar nú regna niður yvir hesa samgonguna, og at fullveldið fær skyldina fyri alt tað, sum hendi undir heimastýrinum. Vit kunnu og mugu ikki lova, at allir trupulleikar verða loystir nú. Tað verða teir ikki — verri enn so. Kanska um 10 ár eru vit komin á eitt rímiliga nøktandi og trygt støði.

Dykkarasjúka

Tey flestu kenna tað sonevndu "dykkarasjúkuna", sum kavarar fáa, um teir fara úr havdýpinum og upp til sjóvarmálan ov skjótt. Allur kroppurin og øll javnvág fer av lagi og tað kann kosta lív og førleika. Tí noyðast teir at fara spakuliga uppeftir og at støðga á innimillum. Ikki tí. Tað læt-tasta er bara at sleppa allari barlast ella brúka luftrýst at drøna uppaftur við. Ella lata onkran annan draga teg upp á eini línu við rúkandi ferð. Men tað fær avleiðingar.

Hesa mynd eiga vit eisini at hava fyri okkum, tá vit viðgera okkara samfelag. Vit raktu botnin undir tí sjúka heimastýrisbúskapinum. Nú ræður um at fara uppeftir við egnari megi og við einum kroppi í javnvág. Tað er keðiligt og tað krevur tol. Men so duga vit eisini at svimja í sjóvarmálanum og hava høvdið á røttum stað, tá vit koma upp.

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

Kærkomin summargestur

Eins og hjá okkum eru ferðamannaskipini ein fráboðan um summarið í Hetlandi. Í tíðindaskrivi frá hetlendska ferðaráðnum verður sagt, at hetlendska summarið kemur við Norrønu

Summarið byrjar í Hetlandi, tá Norrøna er komin, sigur Maurice Mullay, stjóri í hetlendska ferðaráðnum, Shetland Islands Tourism.

Hetlendska ferðaráðið sigur í tíðindaskrivi, at tey heilsa Norrønu sum einum vælkomnum bindiliði millum Hetland, Føroyar og Noreg.

Norrøna var fyrstu ferð í summar í Hetlandi mánadagin á veg til Bergen. Summarferðaætlanin er í ár frá 15. mai til 9. september.

Hetlendska ferðaráðið sigur, at umframt at vera portur úr Norðanlondum til Skotlands, hevur Hetland eina rúgvu av tilboðum til summargestirnar.

Ein serligur summarpakki er í ár gjørdur í samband við túsundáraskiftið. Í pakkanum er millum annað tey væl umtóktu hetlendsku kvøldini, har møguleiki er at royna hetlendskan mat og tónleik. Eisini er ein rúgva av øðrum tiltøkum sum til dømis festivalar ymsa staðni í landinum, »motor show«, »Shetland Pony show« og búnaðarsýning.

»Vit vóna, at gestir okkara í summar fara at dáma líka væl, sum gestirnir í fjør heilt greitt gjørdu,« sigur Maurice Mullay í tíðindaskrivinum frá Shetland Islands Tourism og leggur aftrat:

»Tað hevur ongantíð verið ein betri løta at vitja Hetland.«

ej

Hattin av fyri prestunum

Tað var gleðiligt at hoyra fjølmiðlarnar boða frá, at prestar í Klaksvík og Havnini hava dirvi til at nokta ávísum útlendskum bispum atgongd til prædikastólin í teirra kirkjum. Flestum kunnugt var talan um bispar, sum hava givið samkyndum loyvi til at markera teirra paralag í kirkjuguðstænastu.

Miðflokkurin tekur hattin av fyri tykkara støðutakan og stuðlar tykkum í hesum.

Tað er syrgiligt, at Føroya bispur, sum umboðar ta almennu kirkjuna, sum flest okkara so elle so gjalda til, hevur boðið hesum bispum at prædika í Føroyum.

Fyri Miðflokkin sum partur av politiska myndugleikanum í hesum landi er støðan greið. Um fólkakirkjan so tilvitað, sum hetta bendir á, ætlar at glíða burtur frá sannleikanum, vilja vit arbeiða fyri at avtaka statskirkjuna. Ein vegur til hetta er gjøgnum arbeiðið í grundlógarnevndini.

Vinarliga
Bill Justinussen
Miðflokkurin

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

Oljufeløgini í umsóknum sínum:

Leggja stóran dent á føroyska luttøku í oljuvinnu

Øll oljufeløgini, sum hava latið umsókn inn til Oljumálastýrið, leggja stóran dent á føroyska leiklutin í komandi oljuvirkseminum.

JAN MÜLLER

Eingin ivi er um, at tað verður ein torførur uppgáva hjá føroysku oljumyndugleikunum at skula býta teir ymsu umbiðnu teigarnar millum tær 8 umsóknirnar (fimm bólkar og trý einstøk feløg), sum komu inn frá tilsamans 17 oljufeløgum.

Millum bólkarnir, sum lótu umsókn um leitiloyvi á landgrunninum, er ein reint amerikanskur bólkur. Tað eru oljufeløgini Texaco, Conoco og Murphey. Herfyri var eisini enn eitt amerikanskt oljufelag, Arco við í bólkinum. Tað er nú uppkeypt av BP Amoco.

Hóast Texaco og Conoco ikki teljast millum heimsins størstu oljufeløg, so eru tey tó millum tey størstu oljufeløgini í heiminum. Leitingarstjóri hjá Texaco er Donal Driscoll og er hann sum eg haldi føroyingar veruliga kunnu fáa fyrimunir av.

Donal Driscoll er fegin um, at teir hava fingið ein føroyskan stjóra at hjálpa teimum at taka sær av teim ymsu uppgávunum í Føroyum. Johan Mc Donald í Havn er settur sum stjóri á skrivstovuni hjá Texaco í Havn.

Leitingarstjórin hjá Texaco vísir annars á, at teir leggja alstóran dent á trygdar- og umhvørvisspurningar og hava eisini sjálvur tikið stig til at taka prøvar á leiðunum, har tað verður aktuelt at bora. Teir meta eisini virksemi sítt í GEM at vera av týdningi í hesum sambandi. Annars er hann væl nøgdur við tær umstøður, sum teimum stendur í boði í Føroyum. Eitt nú er tað av stórum týdningi við politiskum stabiliteti. Skattaskipanin er skilagóð og eisini telur tað heldur ikki so lítið, at feløgini skulu ikki eins og í USA gjalda eitt stórt bonus fyri í heila tikið at vera við.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður fær handaða umsóknina frá Sagabólkinum. Her hittir hann Arvid Halvorssen, oddamann fyri bólkin, sum fevnir um Norsk Hydro, Agip og Anadarko

Anadarko stórar vónir

Eitt av feløgunum í Sagabólkinum, amerikanska Anadarko hevur eisini sína egnu umsókn. Richard Hook, leitistjóri sigur, at teir eru nøgdir við samstarvið við Norsk Hydro og Agip, men teir hava so avgjørt eisini at koma við eini serstakari umsókn. Hann dylur ikki fyri, at nettupp Føroyaøkið er sum skræddaraseymað til eitt felag sum Anadarko. Umstøðurnar at arbeiða í føroysku undirgrundini minna ikki sørt um økini har Anadarko er sera virkið í Meksikanska flógvanum. Richard Hook sigur, at arbeiðið teir gera har kemur teimum til góðar við Føroyar. Í dag er Anadarko eitt av teimum feløgunum, sum hevur mest virksemi í Meksikanska flógvanum. -Vit eru fegnir um at kunna brúka royndir og vitan okkara við at finna olju við Føroyar, og vit hoyra til teir, sum veruliga trúgva uppá, at olja finst her.

eisini samskipari av bólkinum. Vit spurdu hann, eftir at teir høvdu latið umsóknina inn til Oljumálastýrið, hvat teir leggja dent á í sambandi við føroyska luttøku.

-Lat meg fyrst gera greitt, at vit meta ikki ein komandi oljuútvikling í Føroyum sum nakað, sum bara kemur og fer. Vit leggja stóran dent á hetta at byrja at byggja nakað upp nú, sum heldur fram langt inn í framtíðina. Tí leggja vit stóran dent á at gera fløgur í eitt nú í útbúgving. Hetta er nakað, sum byggir á royndir og kanningar hjá ikki færri enn trimum stórum oljufeløgum, BP, Amoco og Arco.

BP Amoco bjóðar høgt

Martin Miles frá BP Amoco er sera nøgdur við føroysku útbjóðingina. Tað kenst sum ein lætti loksins at lata inn ógva tilfarið. Hóast tað hevur tikið sína tíð at koma so langt, so heldur hann ikki, at tíðin er burturspilt. Tvørturímóti hava teir brúkt hesa tíðina skilagott, soleiðis at teir í dag hava eina umsókn, sum hann málber seg, fer sera langt og er sera umfevnandi - ein umsókn, sum byggir á royndir og kanningar hjá ikki færri enn trimum stórum oljufeløgum, BP, Amoco og Arco.

-Føroyaøkið hevur ómetaliga stóran týdning fyri okkum, ikki minst tá hugsað verður um tað virksemi sum vit longu hava á Atlantsmótinum.

Martin Miles dylur ikki fyri, at eisini BP Amoco hevur lagt sera stóran dent á at fáa tann føroyska partin við í umsóknina tvs. at kunna útbúgva føroyingar til hesa vinnu, at menna ídnaðin her, ja rætt og slætt at fara undir nýggjan ídnað. Teir hava tí bæði fíggjarliga og tøkniliga lagt stóran dent á henda partin av umsóknini.

Vit spurdu Martin Miles, um teir ikki høvdu staðið seg betur í útbjóðingini, um teir vóru saman við øðrum oljufelag ella feløgum!

-Eg haldi ein má hugsa um, at vit í veruleikanum eru trý stór oljufeløg, sum júst eru løgd saman, BP, Amoco og nú eisini Arco. Saman eru vit eitt sera sterkt felag, bæði fíggjarliga, tøkniliga og vinnuliga í allar mátar. Við at vera eitt felag kunnu vit bera okkum skjótt at, tá avgerðir skulu takast, og í samvinnu við føroyskar myndugleikar kunnu vit bera skjótt at, fara undir at bora skjótt og harvið fáa Føroyum skjót og góð úrslit. Tí haldi eg tað eru nógvir fyrimunir fyri Føroyar, at tað er eitt sterkt felag, sum kann átaka sær leitingaruppgávuna 100%.

BP Amoco heldur seg til at bora longu næsta summar. Hetta tykist eisini at verða galandi fyri nógvar aðrar bólkar. Men tað veldst so um, um trygdar- og umhvørvisreglurnar eru komnar uppá pláss til ta tíð. Hetta er tí upp til føroyskar myndugleikar. Sosialurin skilur, at flestu av samtøkunum hava boripallar tøkar, og m.a. BP Amoco er í tí støðu, at teir skjótt og lætt kunnu flyta ein av pallum sínum til Føroyaøkið. Í løtuni bora teir beint hinumegin markið.

Martin Miles heldur tað vera rætt at siga, , at økið eystan fyri Føroyar stendur sera ovarliga í leitingarskránni hjá BP Amoco. Ein umsókn síni setir felagið fram ynski um at bora í meira enn ávísum stað. Uppá fyrispurning um ein boriskrá eisini umfatar økið inni á tí tjúkka basaltinum sigur hann, at tað felag, sum vil seta borin í har í núverandi støðu er blint.

Sosialurin skilur annars, at flestu av oljufeløgunum, sum hava søkt um lisens, eru nøgd við tey økini, sum eru við í útbjóðingini.

ExxonMobil ikki við

Í dag verður BP Amoco mett sum næststørsta oljufelagið í heiminum. Bert eitt er størri, og tað er Exxon-Mobil. Bæði Esso og Mobil hava leingi verið virkin á Føroyaøkinum, men um somu tíð sum tey vórðu løgd saman, varð gjørt av ikki at vera við í 1. útbjóðing.

Robert Lanyon frá Exxon Mobil sigur í eini viðmerking, at avgerðin um ikki at vera við í leitingini við Føroyar er tikin út frá teimum møguleikum, sum felagið hevur og arbeiðir við kring heimin. Viðmerkingin er annars hendan:

„Our decision not to participate was taken in the context of the worldwide opportunities we are pursuing or in which we are involved".

Stjórin hjá BP Amoco í Føroyum, Hjarnar Djurhuus tekur eina hond í, tá rúgvusmiklað útbjóðingartilfarið varð latið Oljumálastýrinum. Mynd jan

Umboð fyri Oljufyrisitingina saman við umboðum frá Texaco, Conoco og Murphey, eftir at umsóknin varð latin í farnu viku. Nr. tvey til vinstru í aftasta rað nýsetti stjórin hjá Texaco í Føroyum, Johan Mc Donald.